## Grønland á skránni

Tá veðurlagsserfrøðingarnir hjá ST hittast til fundar í Ungarn í næsta mánað, verður innlandsísurin í Grønlandi eitt av høvuðsmálunum á dagsskránni. Povl Frich, sum umboðar Danmark á fundinum, sigur við Nordjyske, at í Landssynningsgrønlandi bráðnar ísurin so skjótt nú, at summastaðni tynnist hann einar 100 metrar um árið. Á fundinum í Ungarn fara serfrøðingarnir at fyrireika ta næstu ST-frágreiðingina um veðurlagsbroytingarnar.



*Summastaðni í Grønlandi bráðnar ísurin so skjótt sum ongantíð fyrr*
*(Mynd: KNR)*

## Almenn nýtsla tálmast

Ein nýggj frágreiðing, sum grønlendska landsstýrið hevur skrivað um búskapin í 2008, boðar frá, at landsstýrið ætlar at tálma almennu nýtsluna. Í niðurstøðuni skrivar Aleqa Hammond, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at skattur og avgjøld kunnu ikki fíggja vælferðina í framtíðini. Tí er neyðugt at menna verandi vinnulív og at finna nýggjar vinnur fyri at tryggja tann búskaparliga vøksturin, sum skal fíggja vælferðina, skrivar Aleqa Hammond.



*Í løtuni ger Magnus Heinason fyrru yvirlitstrolingarnar í ár*
*Mynd: Rógvi Mouritsen*

svium um ikki at keypa tosk, skal tískil síggjast í ljósinum av støðuni í havumhvørvinum kring Svøríki.

Hjalti vísir á, at hóast støðan hjá toskinum í Norðsjónum eftir øllum at døma er batnað nakað, er hon ikki nøktandi. Tað er hon heldur ikki í føroyskum og íslendskum sjógvi, ei heldur við Ný Foundland, har toskurin at kalla bleiv burtur fyri fleiri árum síðan.

- Hinvegin er toskurin betur fyri í Barentshavinum og í Grønlandi í løtuni, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at millum fiskasløgini, sum nørast seinni, og sum eru væl kend her um okkara leiðir, er eitt nú blálonga, kongafiskur og svartkalvi, og tíðin hevur víst, at hesi eru vorðin ov hart roynd.

### Broyta hugburð

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni heldur, at antin vit eru samd ella ósamd við tiltøk hjá náttúrufelagsskapum, er tað kortini ein veruleiki, at tey eisini hava havt sína positivu ávirkan á okkara hugburð.

- Vit mugu ásanna, at lítið skil var í okkara grindadrápi, áðrenn umheimurin setti kikaran á okkum. Í dag er grindadrápið fyrimyndarligt, og tað gongur betur nú enn nakrantíð at avlíva hvalirnar, sigur hann.

Hjalti vísir á, at kunnu tiltøk hjá slíkum felagsskapum fáa okkum at hugsa, hava tey havt sína ávirkan.

- Tiltøkini eiga at minna okkum á, at tilfeingið í havinum er ikki óavmarkað – og at summi fiska- og djórasløg eru verri fyri enn onnur. Summi eru meira viðbrekin, tá ið tey verða troytt ov hart, og onnur eru av náttúrugivnum ávum verri fyri í náttúruni, kanska tí tey nørast seinni.

### Duga ikki hógv

- Toskastovnurin undir Føroyum hevur verið illa fyri seinastu árini, og veiðan er næstan niðri á tí minimala. Sambært hagtølum, sum fevna yvir eitt heilt aldarskiftið, eiga vit at kunna veiða 20.000-25.000 tons av toski undir Føroyum um árið, men veiðan er bert helmingin av hesum.

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni vísir á, at tá ið toskastovnurin kom fyri seg aftur á Føroyabanka tíðliga í 2000-árunum, dugdu vit ikki at drýggja stovnin og veiða hann burðardygt.

- Føroyabanki eigur at kunna bera eini 2.000 tons av góðum toski um árið, men við tað, at vit ikki dugdu okkum hógv, tá ið stovnurin kom fyri seg aftur, er eingin toskaveiða á Bankanum longur, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

# Hetlendska toskaalingin í gjaldssteðg

**Sambært Shetland Times var No Catch heimsins fyrsta toskaalibrúk, og tá ið flest vóru í starvi í hesum partinum av felagnum, vóru tey 130 í tali. Eftir stórt hall er felagið nú í gjaldssteðgi**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fleiri arbeiðsfólk eru søgd úr starvi hjá felagnum No Catch, sum eitt nú hevur toskaaling í Hetlandi. Felagið fór í gjaldssteðg í endanum av februar, tí felagið hevur havt eitt hall upp á stívliga 400 miljónir krónur.

Í fyrsta lagi vórðu 14 fólk søgd úr starvi í framleiðsluni í Scalloway, og síðan eru 14 fólk aftrat søgd úr starvi, flestu í skrivstovupartinum.

Samlaða talið av uppsøgnum er soleiðis komið upp á 28.

Eftir at No Catch fór í gjaldssteðg, hevur Grant Thornton, gjaldsstjóri, havt fíggjarligu ábyrgdina av felagnum.

Málið hjá No Catch var at hava eina framleiðslu upp á 30.000 tons av toski í 2012.

Feløgini, sum hava fíggjað hesa verkætlan, eru Milestone Capital Partners Limeted, íslendski Kaupthing Banki og Singer & Friedlander.

Virksemið hjá felagnum heldur fram, men arbeiðsorkan er niðursett.

Orsakað av fíggjarligu støðuni, verður toskurin ikki virkaður í Scalloway í løtuni, men verður tikin, avhøvdaður og seldur ymiskum keyparum á marknaðinum.

Borgarstjórin í Scalloway, Iris Hawkins, sigur seg harmast uppsagnirnar og støðuna, sum No Catch er komið í við toskaalingini.

Sambært Shetland Times var No Catch heimsins fyrsta toskaalibrúk, og tá ið flest vóru í starvi í hesum partinum av virksemi felagsins, vóru tey 130 í tali.

Sum skilst á hetlendskum fjølmiðlum, hava fleiri stór alifeløg úti í heimi víst áhuga fyri at keypa partar av – ella alla - toskaalingina hjá No Catch í Hetland.



*No Catch, sum alir tosk í Hetlandi, hevur stívliga 400 miljónir krónur í halli og er nú farið í gjaldssteðg*

# okki kring landið

um hava boð verið eftir honum, og eitt nú var hann solistur í kendu operuni hjá Donizetti - Elskovsdrykkurin - fyri nøkrum árum síðani.

Tey fara at ferðast kring landið við einari fjølbroyttari skrá – við hegnisliga úrvaldum sangum. Nevnast kunnu O Solo Mio, Brindisi (drekkivísan) úr La Traviata, Nessun Dorma, Habanera (úr Carmen), Flogmúsin og Wienerblut. Eisini verður tónleikur við íblástri úr fólkatónleiki úr Italia, Onglandi, Týsklandi, Danmark og Føroyum at hoyra.

Saman nevna tey seg »Det Syngende Selskab«, og málið hjá teimum er at geva øllum eina operaupplivng, ið tey ongantíð hava fingið áður.

Á konsertini, sum verður í Klaksvík, luttekur eisini kórið Suð við Steinvør Fonn sum leiðara.

- Vit eru sera fegin um at hava fingið hesar konsertir upp at standa, siga Konsertfelagið og Norðurlandahúsið, sum eru saman um tiltakið.

Konsertirnar verða hesar: Hósdagin 27. mars klokkan 19.30 (Mentanarhúsið, Fuglafirði), fríggjadagin 28. mars klokkan 20.00 (Ósáskúlin, Klaksvík - saman við kórinum Suð) og sunnudagin 30. mars klokkan 16.00 (Norðurlandahúsið).

Atgongumerki á 100 krónur fáast í Norðurlandahúsinum ella á heimasíðu Konsertfelagsins: www.konsertfelag.net